# Porkerningur fiskaði við pápa Lenu Espersen

**Gudmundur Djurhuus úr Porkeri fiskaði við nótaskipinum Lene Polaris hjá Ole Espersen, ið er pápi nývalda Konservativa floks-forkvinnuni, Lenu Espersen. Gudmundur greiðir í samrøðu við Føroysku Tíðindastovuni frá, at millum annað hekk stór mynd av Lenu Espersen í messuni**

*Føroyska Tíðindastovan*
*faroenews@faroenews.com*

Blaðið róði í gjár uppundir í tíðindastubba um nýggja formannin í Konservativa flokkinum, Lene Espersen, at helst mátti verið okkurt samband við Føroyar, við tað at pápi Lene Espersen er stórur reiðari av nótaskipum í Hirtshals. Nógvir føroyingar hava siglt við nótaskipum, ið fiska út frá Hirtshals. Og eisini við skipum hjá Ole Espersen.

Føroyska Tíðindastovan kann so í dag vátta at so er. Vit fingu frænir um porkerningin, Gudmundur Djurhuus, ið skuldi havt mynstrað við nótaskipinum Lene Polaris. Í samrøðu sigur Gudmundur frá:

- Jú tað er rætt! Eg fiskaði við Lene Polaris í 2001 sum kokkur.

- Skipið var uppkallað eftir dóttrina, Lenu Espersen.

- Reiðarin var rættiliga errin av dóttir sínari, ið kláraði seg so væl á teimum bonaðu gólvunum á Christiansborg, greiðir Gudmundur frá.

- Eg var kokkur umborð og minnist serliga væl stóru myndina av dóttrina, Lenu Espersen, ið hekk í messuni.

- Einaferð var Lene Espersen sjálv umborð á skipinum. Haldi tað mundi vera ísambandvið fólkatingvalið. Reiðarin frøddist um frálíka valúrslitið hjá dóttrini, so stórt hátíðarhald var í Hirtshals og Lena kom umborð at heilsa uppá manningina á skipinum hjá pápanum. Sera fyrikomandi var hon, sigur Gudmundur frá. Spurdi áhugað til lívið umborð og tílíkt.



*Gudmundur Djurhuus úr Porkeri hevur siglt við nótaskipum hjá Ole Espersen í Hirtshals*

## Chattar á Facebook við Lene Espersen

Seinni avmynstraði Gudmundur Djurhuus og legðist uppi á landi og flutti til Svøríkis. Føroyska Tíðindastovan spurdi Gudmund um hann enn hevur nakað samband við reiðaríið ella Lenu Espersen:

- Jú, har er ein stuttlig søga. Tað er soleiðis, at eg flutti til Keypmannahavnar í fjør og heilt av tilvild hitti eg Lenu Espersen aftur uppi yvir einum kølidiski í ISO-supermarknaðinum á Amager. Eg kendi hana beinanvegin aftur, men helt ikki at hon mintist meg aftur. Men eg fortaldi so, at eg plagdi at fiska við reiðarínum hjá pápanum. Tá vaknaði hon beinanvegin og vit fingu okkum hugnaligt prát. Var sera blíð og fryntlig, spurdi hvussu gekk hjá mær nú og skuldi bera heilsu víðari til pápan.

Nýggja sambandið við nýkosna Konservativa formanninum, hevur porkerningurin Gudmundur Djurhuus varðveit:

- Ja, í dag er alt so modernað við kommunikatión. Alt fyrigongur á internetinum. So eg havi eisini ein profil á Facebook. Her sá eg so at Lene Espersen eisini hevði ein profil. So vit hava »add'að« hvønn annan sum vinir, sum tað eitur á góðum ný-føroyskum. Og her chattast vit so viðhvørt um mangt og hvat. Jú verðin er vorðin minni, sigur Gudmundur Djurhuus at enda.